## Óneyðugt kríggj



*Donald Rumsfeld, eigur at fara frá, skrivar Greg Newbold.*

– Kríggið í Irak var eitt mistak, og USA hevur tapt bardagan ímóti yvirgangi, skrivar fyrrverandi stjórin í verjumálaráðnum Pentagon, Greg Newbold, í einari grein í tíðarritinum Time Magazine.

Greg Newbold arbeiddi í Pentagon, men fór úr starvinum nakrar fáar mánaðir undan álopinum á Irak. Í greinini skrivar hann, at hann var eisini ímóti álopinum tá, tí eftir hansara tykki var Irak als ikki so vandamikið, sum stjórnin segði. Tann størsti vandin var harafturímóti al-Qaeda, skrivar Greg Newbold og leggur uttanríkisráðharran, Condoleezza Rice, og verjumálaráðharran, Donald Rumsfeld, undir at hava ábyrgdina av einum fullkomiliga miseydnaðum trygdarpolitikki.

– Okkum tørvar nýggj andlit og nýggj hugskot. Tað merkir, at Rumsfeld og onnur eiga at fara frá, tí tey sýttu fyri at broyta hugsan, skrivar fyrrverandi stjórin í verjumálaráðnum.

Sambært Greg Newbold hevur USA gjørt fleiri mistøk í Irak, síðani kríggið endaði. Eitt nú hevur tað tikið alt ov langa tíð at skipa ein irakskan her, og amerikanararnir hava undirmett teir, sum stríðast ímóti hersetingini, skrivar hann.

## Metstór vatnflóð

Týska áin Elben hevur ongantíð vverið so stór sum nú, og í landssynning úr stórbýnum Hamburg stendur tann gamli býurin Hitzacker undir í vatni. Stjórnin hevur sent 1600 hermenn at hjálpa teimum lokalu bjargingarliðunum, og myndugleikarnir hava lovað at veita teimum raktu endurgjald.

Sunnudagin var Angela Merkel, kanslari, á flogi uppi yvir Hitzacker saman við forsætisráðharranum í landspartinum Niedersachsen, Christian Wulff.

Eftir at hava kannað umstøðurnar rósti kanslarin bjargingarliðunum, tí tey eru betur fyrireikað hesaferð enn undir vatnflóðini í 2002.

Elben er eisini farin langt upp um áarbakkarnar aðrastaðni. Í býnum Lauenberg er vandi fyri, at umleið 1.000 hús kunnu rapa orsakað av tí øgiliga trýstinum frá vatninum, og í Prignitz hava bjargingarliðini arbeitt bæði dag og nátt fyri at tálma vatnflóðini, skrivar DPA.

## Skuldi vitja Bush



*Ein fremmandur ætlaði sær at vitja Bush í gjárkvøldið*

Vaktarmenninir uttan fyri Hvítu Húsini í Washington noyddust at taka skammbyrsurnar fram í gjárkvøldið, tá ein maður royndi at sleppa inn í Hvítu Húsini.

Tað eydnaðist manninum at sleppa langt inn um ta ytstu girðingina, sum er rundan um Hvítu Húsini, áðrenn teir vápnaðu vaktarmenninir fingu fatur á honum. Tað vísti seg, at maðurin var óvápnaður, so hann varð latin løgregluni til avhoyringar.

Sambært Reuter segði maðurin ikki, hví hann ætlaði sær inn í Hvítu Húsini, men hildið verður, at hann ætlaði at fáa orð á George W. Bush, forseta. Sambært Reuter. var forsetin við hús í gjárkvøldið.

## Vilja hava kunsttøð

Herfyri sendi Suðurkorea grannalandinum Norðurkorea 150.000 tons av kunsttøðum, men nú norðurkoreanska stjórnin boðað frá, at tørvur er á 300.000 tonsum afturat.

Ein talsmaður hjá suðurkoreonsku stjórnini segði í dag, at partarnir umrøða fyrispurningin í teirri serligu nevndini, sum umsitur samstarvið ímillum tey bæði londini.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Teir fáa dóm í dag





*Valstríðið ímillum Silvio Berlusconi og Romano Prodi hevur verið sera hart og hvassorðað.*

**Í kvøld fæst at vita, um italiumenn vilja hava Silvio Berlusconi ella Romano Prodi til forsætisráðharra.**

**VAL Í ITALIA**

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hóast teir italsku veljararnir hava eitt ørgrynni av valevnum at velja ímillum á tjóðartingsvalinum, sum endar seinnapartin, so stendur stríðið í síðsta enda ímillum tveir menn. Teir kunnu velja ímillum tann 69 ára gamla ríkmannin Silvio Berlusconi, sum hevur verið forsætisráðharri seinastu fýra árini, og tann 66 ára gamla búskaparprofessaran Romano Prodi, sum vann á Berlusconi í 1996, men sum kanska er betur kendur sum fyrrverandi formaður í ES-nevndini.

44 milliónir fólk í Italia hava atkvøðurætt á valinum hesaferð umframt tríggjar milliónir italiumenn, sum búgva uttanlands. Meiningakanningar undan valinum vístu, at tað verður sera javnt ímillum partarnar, og politiskir eygleiðarar í Rom eru á einum máli um, at tann, sum tapir, hevur onga framtíð í italskum politikki.

Sum so ofta fyrr kann veðrið ávirka valúrslitið. Í gjár var av fagrasta veðri nógvastaðni í Italia, og valkøn siga, at tað kemur vinstravonginum hjá Prodi til góðar. Um tað er so, fáa vit at síggja í kvøld.

# Vesturheimurin avbyrgir Hamas og Palestina

**Vesturheimurin vil einki hava við palestinsku Hamas-stjórnina at gera, og kassin hjá sjálvsstýrismyndugleikunum er tómur.**

**MIÐEYSTUR**

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í síðstu viku boðaðu ES, USA og Kanada frá, at tey høvdu steðgað øllum fíggjarligum stuðúli til teir palestinsku sjálvsstýrismyndugleikarnar. Í gjár komu somu boð úr Oslo, og sambært Politiken umhugsar danska stjórnin at gera tað sama.

– Tann fíggjarliga støðan er sera trupul, og tað ber ikki til at siga, nær fólk fáa løn, sigur palestinski fíggjarmálaráðharrin, Omar Abdel-Razeq, við blaðið Al-Ayyam. Sum fíggjarmálaráðharri hevur hann umleið 140.000 fólk á lønarlistanum, og eygleiðarar bera ótta fyri, at fáa tey ikki løn, dettur palestinska samfelagið sundur innaneftir.

Við at steðga stuðulinum hevur Vesturheimurin givið Hamas-stjórnini knívin á barkan. Boðini eru greið: Hamas skal viðurkenna ísraelska ríkið og teir sáttmálar, sum PLO hevur gjørt vegna palestinska fólkið, og harafturat skal Hamas frásiga sær øll rættindi til at brúka harðskap.

Men tað eru ikki øll í Miðeystri, sum eru so fegin um kravboðini úr Vesturheiminum. Í Egyptalandi og Jordan stúra myndugleikarnir fyri, at vesturlendska avbyrgingin fer at knýta Hamas tættari londum sum Saudiarabia og serstakliga Iran, sum eru til reiðar at veita palestinum fíggjarliga hjálp.

Ísrael hevur ikki lagt seg út í ósemjuna ímillum Vesturheimin og teir palestinsku myndugleikarnar, men í gjár segði Ehud Olmert, forsætisráðharri, at ísraelska stjórnin fer at gera sítt til at forða fyri, at palestinar fáa eina arbeiðsføra Hamas-stjórn.

Enn er einki, sum bendir á, at Hamas ætlar at sleppa sínari gomlu grundhugsjón um at strika Ísrael av heimskortinum, men Ismail Haniyah, forsætisráðharri, hevur sagt seg vera til reiðar at lata sínar ráðharrar samskifta við ísraelskar ráðharrar um felags spurningar, skrivar Reuter.

Illur???

Sig tína meining í Sosialinum

